
Byford Dolphin borar eftir olju. Mynd: BP

# Oljuprísurin kúvendi í kvøld

**Jógvan Hugo Gardar**

27.08.2015 - 21:19

Oljan.fo

Prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent kúvendi í kvøld. Aftaná at lække skjótt farnu vikuna fór prísurin brádliga at hækka aftur í kvøld, og prísurin er higartil í dag hækkaður næstan átta prosent. Nú um hálvgum níggjutíðina er prísurin eitt vet omanfyri 47 dollarar fyri fatið. Í morgun nærkaðist hann 40 dollarum.

Ein so stóran vøkstur eftir einum degi hevur oljumarknaðurin ikki sæð síðani fíggjarkreppuna í 2009.

Thina Saltvedt, oljugreinari hjá Nordea Markets, sigur sambært E24 at høvuðsorsøkin til at prísurin er farin at hækka er at kinverskir myndugleikar hava sett í gongd tiltøk fyri at steðga niðurgongdini á kinversku keypsskálunum. Hetta tóku keypsskálarnir um allan heim gott ímóti. Samstundis komu tøl úr USA sum vísa vøkstur í amerikanska búskapinum.